# Zuma var í serflokki

**Álopsmakkarin hjá Toda Jónsson skoraði eina ferð og legði upp til hini trý málini, tá FCK vísti besta avrikið í ár**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Góða páskaveðrið var burtur, men kortini møttu fimtan túsund upp í Parkini sunnudagin, og teir flestu av áskoðarunum høvdu nógv at fegnast um. Í 1. hálvleiki spældi FCK gestirnar úr Odense sundur og saman. Tá spælararnir fóru av vøllinum eftir fyrra umfarið, var støðan 3–0, og tað var ikki eitt mál ov stór leiðsla til heimaliðið, heldur tvørturímóti.

Í seinna umfarinum tóku teir í FCK tað meiri róliga. Ferðin var ikki tann, sum hon hevði verið. Tað tóktist sum um, at hugsanirnar longu vóru í uppgávunum, sum eru á skránni í annaðkvøld og aftur sunnudagin. So tætt liggja dystirnir í superliguni.

Úrslitið varð 4–0, og ein maður var eyðsýndur fram um allar hinar. Tað var álopsmakkarin hjá Toda Jónsson, Zuma. Hann skoraði fyrsta málið, tá eitt korter var farið. Eftir langskot og hálvbjarging var hann fyrstur á returbóltinum, og so var tónin sligin ann.

FCK skoraði trý mál afturat, og Zuma átti hvørja ferðina næstsíðsta fótin. Í 28. minutti smeyg hann sær ígjøgnum í vinstru, og væl upplagdi Thomas Røll setti fótin á. Í 34. minutti var uppskriftin tann sama. Zuma rann frá OB verjuni í vinstru, og Todi Jónsson hevði fullkomuliga opið mál, tá hann skuldi skora til 3–0. Men Todi var óheppin. Hann kundi havt sett innaru síðuna á høgra fóti undir bóltin og skorað. Men í staðin valdi hann at vera uppaftur meiri nærlagdur. Temjingin við høgra og yvir til vinstra bein var ikki nóg góð, bólturin stakk ein metur frá Toda, og tá verjuspælarin Torben Sangild royndi at takla støkk bólturin í netið. Harmuligt hjá Toda.

Einasta málið í 2. hálvleiki var ein sovorðin perla, sum sjáldan er at síggja í donskum fótbólti. Aftur var Zuma upp á spæl í vinstru. Bólturin varð lagdur skrátt aftur eftir til norska Erik Mykland, sum úr 20 metrum smekkaði til. Bólturin brast í tvørtræið, áðrenn hann fór í málið.

Donsku fjølmiðlarnir góvu øllum FCK liðnum gott skoðsmál. At vera álopsmaður og at misnýta møguleikar kostar. Todi og tríggir liðfelagar fáa miðalkarakterin – 8. Hinir fáa níggju og tíggju.

### Ansar sær

Todi var ikki á liðnum hjá FCK, tá teir í síðstu viku spældu fyrru hálvfinaluna í steypakappingini. Í onkrum av donsku fjølmiðlunum varð sagt, at Todi hevði mist plássið, tí hann ikki skoraði nóg nógv mál.

Hetta var ikki frágreiðingin hjá Toda. Hann hevði undan dystinum kent, at lærið var eitt sindur stívt, og tí hevði hann spurt, um tað bar til at sleppa undan at spæla. Men hann var klárur at taka eitt tørn, um venjarin segði, at tað skuldi hann gera.

Todi sigur, at sjálvandi er tað ein møguleiki fyri, at avloysarin skorar mál, og so er ikki víst, at tú verður biðin aftur. Peter Møller loysti av í steypadystinum. Hann skoraði, men kortini var Todi í FCK álopinum sunnudagin.

FCK venjarin lat teir somu ellivu spælararnar vera á vøllinum allar 90 minuttirnar ímóti OB. Ivaleyst vónaði hann, at tað skuldi eydnast hjá Toda at fáa mál. Tað eydnaðist ikki, men Todi var væl við í samanspælinum – ikki minst við stórstjørnuna Zuma, sum – um hann megnar at halda fram, sum hann hevur gjørt higartil í vár – fer at verða seldur til okkurt annað felag fyri nógvar milliónir.

FCK skal aftur í eldin longu í annaðkvøld. Tá skulu teir spæla í Ikast ímóti FCM. Sunnudagin skulu teir spæla í Lyngby. Ivaleyst vil venjarin hava, at Todi er á liðnum í Ikast. Ímóti Lyngby er lættari at lata onkran av teimum bestu hvíla seg. Ímóti Lyngby er møguleikin góður at taka seg upp eftir málskjúttaralistanum. Tí er einki at ivast í, at Todi hevði viljað verið við í tí dystinum.

# Óli syrgdi í síðstu løtu fyri javnleiki

**Øll tey føroysku feløgini í næstbestu deildini fingu stig, og nú tykist vandin fyri at Hvidovre skal flyta niður at vera sera lítil**

1. DEILD Í DANMARK
*Jóannes Hansen*

Óli Johannesen verður mettur sum ein hin besti og kanska hin tryggasti verjuspælarin í Hvidovre.

Sunnudagin varð enn eina ferð staðfest, at tá tað stendur nógv á, og tá tað er alneyðugt at fáa mál í hinum endanum, so er Óli Johannesen ein trumfur.

Horsens var og vitjaði í Hvidovre sunnudagin. Leingi sá tað rættuliga svart út hjá heimaliðnum. Teir fingu eitt mál ímóti sær í 1. hálvleiki, og tá seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt økti Horsens til 2–0, eftir at málverjin, Stephen Andersen, sum annars er sera álitisfullur, hevði hálvkiksað. Og so bendi nógv á, at øll stigini skuldu fara til Jyllands. Frammanundan dystinum høvdu teir í Hvidovre annars vónað, at teir skuldu fáa øll stigini.

Síðstu løtuna eydnaðist tað Hvidovre at skora tvær ferðir. Óli Johannesen var fluttur fram í álopið, og hann javnaði í yvirtíðini til 2–2. Tað gjørdi hann, eftir at bólturin var komin innfyri úr høgru.

Johan B. Hansen og Fredericia spældu 2–2 í Skive, og felagið hjá Atla Gregersen, Randers Freja, gjørdi eitt orduligt hál. Teir vóru á útivølli ímóti oddaliðnum í Køge. Í einari handavending kom Køge framum 2–0, og alt bendi tí-skil á tryggan heimasigur. Men Randers Freja javnaði til 2–2, og tá teir komu framum 3–2, vóru teir á heimaliðnum noyddir at sleppa í verjupartinum. Teir trýstu fyri at javna til 3–3, men í staðin vóru tað gestirnir sum í snarálopi øktu til 4–2.

Farum hevur ongantíð roynt seg í bestu deildini. Átta av spælarunum hava áður verið í superliguni. Tá vóru teir Lyngby spælarar. Venjarin, Christian Andersen, og stjórin, Poul Hansen, hava báðir royndir úr bestu deildini. Teir hava verið venjarar hjá ávikavíst AB og FCK og hjá Lyngby.

Í vikuskiftinum var Farum í Århus, har teir vunnu 2–1 ímóti FC Århus. Tað hevði við sær, at Farum er púra javnt við Frem í kappingini um næstfremsta plássið. Hesa ferð vann Frem 3–1 á útivølli ímóti B93. Gamla stórfelagið, sum Øssur Hansen spældi við eitt skifti í fjør, er í tungum sjógvi. Hóast Preben Elkjær og aðrir hava spýtt pengar í, so tykist torført at venda gongdini, sum er ímóti niðurflyting.

Herfølge vann 1–0 í Odense ímóti B1913, og HFK Sønderjylland, sum fegið vil uppaftur í superliguna, men sum haltar eitt sindur aftanfyri oddaliðini, vann 5–1 á heimavølli ímóti Brønshøj.

# Brøndby kiksaði ímóti Christian Høgna

**Spenningurin um DM er ikki heilt burtur, og í botninum lyfti Vejle sær eitt vet longri burtur frá niðurflytingarstrikuni**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*


Christian Høgni Jacobsen var í Vejle álopinum frá fyrsta bríksli, og hann fær eitt sjey tal fyri sítt avrik.

Tað gekk ikki, sum teir høvdu ætlað, tá oddaliðið í superliguni, Brøndby, sunnudagin var í Vejle. Úrslitið var 1–1. Brøndby er framvegis nógv fremst. Men munurin aftur til FCK minkaði til sjey stig. Tað er nógv, og alt bendir framvegis á, at Brøndby verður meistari. Men møguleikin, fyri at FCK skal fáa teir aftur, vaks eitt sindur. Kanska verður tað heilt spennandi, tá FCK í næstsíðsta umfarinum fær vitjan av Brøndby. Tað er í sambandi við tann dystin, at Sosialurin saman við Atlantic Airways skipar fyri ferð til Keypmannahavnar.

Christian Høgni Jacobsen var í Vejle álopinum frá fyrsta bríksli. Hann spældi í ein tíma. So varð hann skiftur út, og hann fær eitt sjey tal fyri sítt avrik. Vejle var alla tíðina verjukent, og teir royndu miðvíst at fáa ferðina niður. Harvið noyddust álopsspælararnir at arbeiða nógv einsamallir, tí teir fingu lítlan stuðul frá aftaru monnunum. Tað er ikki altíð so hugaligt, og tað sæst ikki altíð so nógv eftir, men tað eru korini, tá tú ert í álopinum hjá einum undirtippaðum liði, sum spælir ímóti oddaliðnum.

Fimm minuttir eftir útskiftingina kom Brøndby á odda. Ruben Bagger skoraði málið, og so var Brøndby mest hugað fyri at verja tepru leiðsluna og harvið at fáa øll stigini við aftur til hús. Tað eydnaðist ikki. Tveir minuttir undan dystarenda stútaði Jan Sønksen í málið aftanfyri Mogens Krogh. Í Vejle leguni vóru teir sera væl nøgdir við at hava fingið eitt stig ímóti oddaliðnum. Tað hevði við sær, at gloppið niður til strikuna vaks frá einum og til tvey stig.

### AGF illa statt

Í síðstu viku fekk venjarin hjá AGF, John Stampe, sekkin. Liðið hjá honum hevði í fyrstu fimm dystunum eftir vetrarsteðgin bara skorað eitt mál. Tað var ikki nóg mikið, og so fekk unglingavenjarin Hans Petersen møguleikan í heita stólinum.

Á heimavølli ímóti FCM eydnaðist tað AGF at skora tvey mál. Men tað var ikki nóg mikið. FCM vann 3–2. Sigursmálið fingu teir, tá tað restaðu fýra minuttir. Harvið noyddust teir í AGF enn eina ferð at ásanna, at botnliðini sjáldan hava marginalirnar á sínari síðu. Nú sær tað svart út hjá stórliðnum í Århus. Í annaðkvøld skulu teir spæla á útivølli ímóti Brøndby, og sunnudagin fáa teir vitjan av AaB, sum er á bronsuplássinum.

AaB vann sunnudagin tepran og sera týdningarmiklan sigur í Esbjerg. Einasta málið skoraði Mikkel Beck, tá tað restaðu tríggir minuttir av fyrra umfarinum. At Mikkel Beck skoraði mundi kennast sum ein stórur lætti – bæði hjá spælaranum og í felagnum sum heild. Mikkel Beck varð í vetrarsteðginum leigaður úr franska felagnum Lille. Ætlanin var, at hann skuldi skora málini, sum AaB í heyst hevði trupulleikar at fáa burturúr møguleikanum. Málið í Esbjerg var tað fyrsta hjá Mikkel Beck, síðani hann kom til AaB.

Støðan hjá AGF gjørdist uppaftur verri av, at tað eydnaðist Silkeborg at megna 1–1 á heimavølli ímóti AB. Lyngby legði hesa ferð á heimavølli rygg til 5–1 tap ímóti Viborg.

Í annaðkvøld sær skráin soleiðis út: AB – Esbjerg, AaB – Vejle, Brøndby – AGF, FCM – FCK, OB – Lyngby og Viborg – Silkeborg. Sunnudagin sær skráin soleiðis út: AGF – AaB, Esbjerg – Viborg, Lyngby – FCK, Silkeborg – OB, Vejle – AB og Brøndby – FCM.



# John Arni Nilssen langt fremstur

**Nýggi styrkislistan í talvi er júst dagførdur, og eingin ivi er um, at á pappírinum er John Arni Nilssen nógv hin sterkasti føroyski telvarin**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Nýggi styrkilistin fyri føroyskar telvarar vísur, at í løtuni kann eingin hótta John Arna Nilssen sum nú hevur heili 2384. John Arni hevði góð úrslit í donsku liðkappingini, og í einari vikuskiftiskapping í Keypmannahavn. Tað gav honum enn eitt ratinglop rætta vegin.

Næsti í røðini er Heini Olsen, sum hevur tikið annað plássið frá IM John Rødgaard. Heini hevur telvað væl seinasta hálvárið á flatlondum, eisini í donsku liðkappingi, og er bert eitt ratingstig frá 2300. John Rødgaard misti nøkur stig eftir liðkappingina og einstaklinga-FM.


*John Arni Nilsen er í løtuni nógv hin sterkasti føroyski telvarin*

### FM var gott hál

Føroyameistarin Hans Kristian Simonsen hevur gjørt eitt megnarhál uppeftir listanum, og sjálvur sigur hann at málið er 2300 áðrenn hetta talvár er av. Sjálvsálit hevur maðurin, og ei heldur er tað merkiligt. Allarhelst fer júst sjálvsálitið og talvdygdirnar at førka okkara nýggja stjørnuskot úr Kollafirði enn longur fram í oddin.

Er fyrsta pláss væl tryggjað hjá John Arna, kann ikki sigast tað sama um hini oddaplássini. Har er gott stríð, og hetta kappingarstríð er jú eisini gott fyri føroyska telving.

Olympiaduár er og kampur um plássini er tí sjálvsagt í hásæti. Tá rating viðvíkur er John Arni sjálvskrivaður, og allarhelst eisini Rødgaard og Heini Olsen. Hesir seinast nevndu hava eisini øgiliga rutinu, sum er alneyðug í Talv-OL, sum í ár verður í Slovenia um mánaðarskifti oktobur/novembur.

Hans Kristian er besti unglingur samstundis sum hann er føroyameistari. Hann verður tí á fyrsta sinni eisini við á olympiaduni. Síðani eru tvey pláss eftir at manna seksmanshópin, og sum tað sæst á listanum eru nógvir um boðið. Flóvin Tór Næs er besta boð, tá rating viðvíkur, sum fimti maðurin, men ikki langt niðanfyri eru Eyðun Nolsøe og Ólavur Simonsen.

Olympiaduliðið verður eftir ætlan úttikið 1. august, soleiðis at teir úttiknu hava góða tíð at fyrireika seg til kappingina, samstundis sum møguleiki er at gera ein vørr í summarmánaðunum innan endaliga úttøkan verður veruleiki.

# Føroyski toppurin apríl 2002

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | John Arni Nilssen | HT | 2384 |
| 2 | Heini Olsen | KTF | 2299 |
| 3 | John Rødgaard, IM | VT | 2272 |
| 4 | Flóvin þór Næs | HT | 2251 |
| 5 | Eyðun Nolsøe | KTF | 2232 |
| 6 | Ólavur Simonsen | KTF | 2208 |
| 7 | Hans Kristian Simonsen | KT | 2196 |
| 8 | Torbjørn Thomsen | KT | 2194 |
| 9 | Jóan Hendrik Andreasen | HT | 2193 |
| 10 | Rógvi W. Rasmussen | HT | 2189 |
| 11 | Bogi Ziska | SF | 2164 |
| 12 | Jens Kristian Hansen | TT | 2157 |
| 13 | Rani Nolsøe | KTF | 2154 |
| 14 | Martin Poulsen | HT | 2120 |
| 15 | Carl Eli N. Samuelsen | HT | 2111 |
| 16 | Heini Danielsen | HT | 2109 |
| 17 | Steintór Rasmussen | KTF | 2103 |
| 18 | Martin Brekká | TFS | 2079 |
| 19 | Terji Petersen | KTF | 2066 |
| 20 | Torkil Nielsen | ST | 2058 |
| 21 | Olaf Berg | HT | 2042 |
| 22 | Finnbjørn Zachariasen | TFS | 2041 |
| 23 | Herluf Hansen | HT | 2013 |
| 24 | Tummas M. Anthoniussen | KTF | 2004 |
| 25 | Bernhard Thomsen | KT | 1985 |

# Talvið hesa vikuna

Hans Kristian Simonsen og IM John Rødgaard lógu undan seinasta umfari í FM javnir á fremsta plássi. Hans Kristian vann á Carl Eli N. Samuelsen meðan Martin Poulsen vann heldur óvæntað á John, sum tískil datt aftur á fjórða pláss í røðini aftanfyri Eyðun Nolsøe, Ólavur Simonsen og Hans Kristian.

Martin Poulsen (2111) — IM John Rødgaard (2291)

Meistarabólkur (9. umfar)
1.d4 e6 2.c4 d5 3.Ric3 Rif6 4.Rif3 Be7 5.Rie5 0-0 6.g3 c5 7.cxd5 Rixd5 8.Bg2 Rixc3 9.bxc3 Rid7 [9...cxd4 10.Fxd4 Fc7 tykist gott hjá svørtum]



10.Rixd7 Fxd7 11.0-0 Rd8 12.Be3 Fc7 13.Fb3 Rb8? [13...c4 14.Fb5 Bd6 og nøkunlunda javnvágur er í støðuni ] 14.Bf4 Bd6 15.Bxd6 Rxd6 [15...Fxd6 hevði kanska kunna bjargað svørtu støðuni] 16.Fb5! Kf8 17.dxc5 Rd8 (hvítur hevur nú greiðan fyrimun) 18.Rfd1 Bd7 19.Fb4 Bc6 20.Rd6 Bxg2 21.Kxg2 Rdc8 22.Rad1 g6 23.Rd7 Fc6+ 24.Kg1 Rc7 DIAGRAM 25.R1d6! Fxd7 26.Rxd7 Rxd7 27.c6+ Re7 28.Fd6 1-0

## Danska superligan

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Brøndby | 25 | 16 | - | 6 | - | 3 | 56 | 20 | 36 | 54 |
| 2 | FCK (M) | 25 | 13 | - | 8 | - | 4 | 44 | 18 | 26 | 47 |
| 3 | AaB | 25 | 14 | - | 4 | - | 7 | 41 | 31 | 10 | 46 |
| 4 | OB | 25 | 10 | - | 8 | - | 7 | 37 | 37 | 0 | 38 |
| 5 | AB | 25 | 9 | - | 10 | - | 6 | 37 | 26 | 11 | 37 |
| 6 | Esbjerg | 25 | 11 | - | 4 | - | 10 | 36 | 35 | 1 | 37 |
| 7 | FCM | 25 | 9 | - | 9 | - | 7 | 31 | 22 | 9 | 36 |
| 8 | Viborg | 25 | 7 | - | 10 | - | 8 | 31 | 30 | 1 | 31 |
| 9 | Silkeborg | 25 | 6 | - | 6 | - | 13 | 27 | 33 | -6 | 24 |
| 10 | Vejle | 25 | 5 | - | 7 | - | 13 | 29 | 56 | -27 | 22 |
| 11 | AGF | 25 | 4 | - | 8 | - | 13 | 28 | 41 | -13 | 20 |
| 12 | Lyngby | 25 | 2 | - | 8 | - | 15 | 21 | 69 | -48 | 14 |

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Køge | 17 | 13 | - | 1 | - | 3 | 36 | 17 | 19 | 40 |
| 2 | Frem | 19 | 11 | - | 5 | - | 3 | 41 | 21 | 20 | 38 |
| 3 | Farum | 18 | 11 | - | 5 | - | 2 | 39 | 24 | 15 | 38 |
| 4 | HFK Sø. | 18 | 11 | - | 3 | - | 4 | 38 | 24 | 14 | 36 |
| 5 | Herfølge | 19 | 10 | - | 5 | - | 4 | 29 | 19 | 10 | 35 |
| 6 | B 1913 | 19 | 10 | - | 4 | - | 5 | 32 | 26 | 6 | 34 |
| 7 | AC Horsens | 19 | 8 | - | 6 | - | 5 | 27 | 20 | 7 | 30 |
| 8 | Randers F. | 19 | 8 | - | 5 | - | 6 | 29 | 23 | 6 | 29 |
| 9 | FC Aarhus | 18 | 6 | - | 5 | - | 7 | 25 | 28 | -3 | 23 |
| 10 | B 1909 | 19 | 5 | - | 5 | - | 9 | 31 | 42 | -11 | 20 |
| 11 | Hvidovre | 19 | 4 | - | 7 | - | 8 | 29 | 37 | -8 | 19 |
| 12 | Brønshøj | 19 | 5 | - | 4 | - | 10 | 27 | 38 | -11 | 19 |
| 13 | Fredericia | 18 | 3 | - | 5 | - | 10 | 21 | 26 | -5 | 14 |
| 14 | Kolding FC | 19 | 4 | - | 2 | - | 13 | 31 | 48 | -17 | 14 |
| 15 | B93 | 19 | 3 | - | 4 | - | 12 | 23 | 43 | -20 | 13 |
| 16 | Skive | 19 | 2 | - | 4 | - | 13 | 22 | 44 | -22 | 10 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), Johan Byrial Hansen (Fredericia)

## Hollendska toto-deildin

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC Zwolle + | 30 | 19 | - | 7 | - | 4 | 55 | 29 | 26 | 64 |
| 2 | RBC Roo'daal | 30 | 19 | - | 5 | - | 6 | 68 | 33 | 35 | 62 |
| 3 | Excelsoir + | 30 | 18 | - | 7 | - | 5 | 66 | 29 | 37 | 61 |
| 4 | ADO Den Haag | 30 | 17 | - | 7 | - | 6 | 50 | 31 | 19 | 58 |
| 5 | Emmen | 30 | 16 | - | 7 | - | 7 | 48 | 34 | 14 | 55 |
| 6 | FC Volendam | 30 | 13 | - | 7 | - | 10 | 59 | 43 | 16 | 46 |
| 7 | Cambuur/L. + | 30 | 13 | - | 6 | - | 11 | 44 | 35 | 9 | 45 |
| 8 | Heracles A. | 30 | 13 | - | 4 | - | 13 | 48 | 48 | 0 | 43 |
| 9 | BV Veendam | 30 | 12 | - | 6 | - | 12 | 51 | 51 | 0 | 42 |
| 10 | Storm/Telstar | 29 | 9 | - | 9 | - | 11 | 44 | 39 | 5 | 36 |
| 11 | Dordrecht '90 | 30 | 9 | - | 9 | - | 12 | 55 | 58 | -3 | 36 |
| 12 | Haarlem | 29 | 10 | - | 6 | - | 13 | 34 | 39 | -5 | 36 |
| 13 | Helmond Sp. | 30 | 7 | - | 13 | - | 10 | 30 | 42 | -12 | 34 |
| 14 | MVV | 30 | 8 | - | 7 | - | 15 | 42 | 55 | -13 | 31 |
| 15 | VVV | 30 | 9 | - | 4 | - | 17 | 44 | 60 | -16 | 31 |
| 16 | G.A. Eagles | 30 | 7 | - | 9 | - | 14 | 40 | 55 | -15 | 30 |
| 17 | Eindhoven | 30 | 5 | - | 6 | - | 19 | 41 | 71 | -30 | 21 |
| 18 | Top/Oss | 30 | 3 | - | 5 | - | 22 | 21 | 88 | -67 | 14 |

Perioduvinnararnir eru merktir »+«

Føroyskir leikarar: Súni Olsen (FC Zwolle)

## Enska 3. deild

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Luton | 44 | 29 | - | 6 | - | 9 | 94 | 48 | 46 | 93 |
| 2 | Plymouth | 43 | 28 | - | 9 | - | 6 | 63 | 27 | 36 | 93 |
| 3 | Cheltenham | 42 | 20 | - | 14 | - | 8 | 63 | 45 | 18 | 74 |
| 4 | Mansfield | 43 | 22 | - | 7 | - | 14 | 67 | 56 | 11 | 73 |
| 5 | Rochdale | 43 | 19 | - | 14 | - | 10 | 59 | 48 | 11 | 71 |
| 6 | R&D | 44 | 19 | - | 13 | - | 12 | 65 | 49 | 16 | 70 |
| 7 | Scunthorpe | 44 | 18 | - | 14 | - | 12 | 72 | 54 | 18 | 68 |
| 8 | Shrewsbury | 44 | 19 | - | 10 | - | 15 | 62 | 51 | 11 | 67 |
| 9 | Hartlepool | 44 | 18 | - | 11 | - | 15 | 65 | 47 | 18 | 65 |
| 10 | Kidderm. | 44 | 18 | - | 9 | - | 17 | 54 | 46 | 8 | 63 |
| 11 | Hull C. | 43 | 16 | - | 11 | - | 16 | 53 | 46 | 7 | 59 |
| 12 | Southend | 44 | 15 | - | 12 | - | 17 | 51 | 52 | -1 | 57 |
| 13 | Macclesfield | 44 | 15 | - | 11 | - | 18 | 41 | 52 | -11 | 56 |
| 14 | Exeter | 44 | 14 | - | 12 | - | 18 | 47 | 70 | -23 | 54 |
| 15 | Carlisle | 42 | 12 | - | 14 | - | 16 | 49 | 52 | -3 | 50 |
| 16 | Darlington | 43 | 13 | - | 11 | - | 19 | 55 | 65 | -10 | 50 |
| 17 | Torquay | 44 | 12 | - | 14 | - | 18 | 42 | 57 | -15 | 50 |
| 18 | York | 42 | 14 | - | 8 | - | 20 | 48 | 65 | -17 | 50 |
| 19 | Swansea | 44 | 13 | - | 11 | - | 20 | 50 | 68 | -18 | 50 |
| 20 | Leyton O. | 44 | 12 | - | 12 | - | 20 | 53 | 70 | -17 | 48 |
| 21 | Oxford Utd. | 44 | 11 | - | 14 | - | 19 | 52 | 58 | -6 | 47 |
| 22 | Bristol R. | 43 | 11 | - | 11 | - | 21 | 38 | 54 | -16 | 44 |
| 23 | Lincoln C. | 44 | 10 | - | 14 | - | 20 | 42 | 60 | -18 | 44 |
| 24 | Halifax | 44 | 7 | - | 12 | - | 25 | 33 | 78 | -45 | 33 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)